

»Dagur og vika« tók sær í so góðar stundir til sendingina týskvøldið. Hon var eisini 10 minuttir longri enn ætlað, og tað var ikki neyðugt við tí tilfarinum, sum var. Røðan hjá Hans Thomsen fyri Hans Jacob Højgaard, tónaskaldinum, sum hevði føðingardag, var ein sonn fragd at hoyra. Hans Thomsen skrivar ikki eitt orð, sum ikki hevur týdning fyri heildina. Røðan var sum ein stuttsøga í bundnum máli.

Gýðingar í Sovjetsamveldinum hava ikki góðar umstøður. Tað hevur verið frammi í mong ár, og tí er tað ikki so løgið, at teir vilja sleppa til Ísraels. Teir eru ein minniluti í samfelagnum, sum har eins og aðrastaðni hava verið við undirlutan.

Í sendingini myndaði gerandisdagur teirra sum hjá »fremmandaarbeiðarunum« í øðrum londum. Har var eitt samfelag í samfelagnum. At russar eisini hava ein anti-gýðingafelagsskap á almennum stigi er neyvan upplýst áður. At so ein rabbinari var limur í hesum, er ikki til at skilja. Tá rabbinarin gav frágreiðingina í sjónvarpinum, hvi hann var limur, kom tað heldur ikki fram. Hesin partur í sendingini var veikur, meðan hin parturin var greiður og vísti væl viðurskiftini hjá hesum minniluta.

Týskvøld er vanliga besta sendikvøldið í vikuni, tí har fáa fjølbroyttar sendingar innivist. Her verður ikki bert hugsað um at undirhalda við lættisoppatilfari, og soleiðis átti at verið í størri mun sum heild.

Sjónvarpsleikurin »Frælsur sum fuglurin« var ikki serliga frælsur, tí foreldrini at tveimum børnum setti seg uttan fyri samfelagsskipanina, sum í hesum føri var at nokta børnunum skúladongd. Í forummælinum til henda filmin varð upplýst, at rithøvundin her og í øðrum arbeiðum sínum vildi seta spurnartekin við samfelagsskipanina — í hesum føri um skúlaskipanina í Bretlandi. Tá dótturin sjey ára gomul ikki vildi fara í skúla, tóku foreldrini avleiðingarnar. Tey fluttu út á landið og undirvístu dóttrini og seinni soninum, á slíkan hátt, sum tey hildu vera mest gagnligt fyri børnini.

Tað var ikki rætt eftir skipanini, har eins og her — børn hava skyldu at ganga í skúla eitt áramál.

Áður hava verið filmar, har rættargongd hevur verið høvuðsleikurin, men tá hevur sum oftast verið ein ákæra fyri morð. Tað er besta undirhaldstilfar í sjónvørpum kring heimin.

Her vóru foreldur ákærd fyri, at børn teirra ikki gingu í skúla. Sorgarleikurin í øllum hesum var, at ákærarnir og dómari skiltu ikki foreldrini, tí teir bert tóku fyrivarni í lógum. Menniskjansliga umhvørvið, foreldrini høvdu skapt og teirra egnu meiningar um, hvat var best fyri børnini, var ikki tikið við í umhugsanini. Syndarligt at siggja, hvussu mannminkandi viðferð foreldrini og dóttirin fingu.

Tað kann vera torført fyri ein uttanfyristandandi at meta um, hvørja revsing ein brotsmaður skal hava — í mun til eitt ávíst lógarbrot. Her var kortini eingin, sum hevî gjørt seg inn á nakran, men kortini fingu tey revsing.

Hóast tað er so natúr-ligt, at børn ganga í skúla, so var tað í leikinum eitt vónbrot, at drongurin ikki fekk loyvi at hava sítt friðarliga umhvørvi í frið. Og kortini, hvat skal ein persónur gera, um hann so fullkomiliga verður settur uttan fyri lóg og rætt, í einum samfelag, sum krevur, at tú skalt duga at lesa og skriva? Dygdin í hesum leiki var avgjørt, at rithøvundin ikki gjørdi børnini til smáar ævintýrahetjur, men myndaði foreldur og børn á so natúrligan hátt, at tú fekst samkenslu við tey, at samfelagsskipanin ikki loyvdi teimum innivis.

Dagny Joensen



Fríggjakvøldið kl. 21.45

Watergate

Henda sending byrjar har filmurin »Alle præsidentens mænd« endaði — nevniliga har innbrotið í høvuðsskrivstovuni hjá demokratiska flokkinum í Watergate í Washington, fór fram. Tað er greitt, at ein ella fleiri meðarbeiðarar hjá NIxon, forseta, hava framt okkurt lógarbrot.

Serliga áhugavert við sendingini í kvøld er, at tað er veruleiki vit upplíva. Tað eru veruligu persónarnir John Dean, John Mitchell, Bob Haldeman og John Erlichman vit siggja vitna í rættinum.

— Eingin hevði ánilsî um, hvar »svartiper« fór at enda, tá avhoyringarnar byrjaðu. Vit fylgja avhoyringunum, sum so hvørt sum fráliður, sníkja seg upp í ovastu leiðsluna og enda hjá Nixon, forseta.

Fríggjakvøldið kl. 23.10

Anna Lotta

Hetta er framhald av tónleikakappingini um væl umtóktu rósuna í gull, silvur ella bronsu, sum kappast verður um í Montreux. Hesaferð skulu vit siggja og hoyra svenska tónleikauppleggið, sum Anna Lotta stendur fyri. Hon er ein av teimum stóru tónlistafólkunum í Svøríki, innan opera og rock. Anna Lotta framførir saman við Sten Ljunggren, sjónleikara. Tey bæði hava í felag skrivað smáleikir og tónleikapetti til hesa kapping.



sjónvarp

Hósdagin 13. september

20.00 **Ítróttur**

Fríggjadagin 14. september

19.30 **Dýrafilmur**
20.00 **Dagur og vika**
20.30 **Rok á gistingarhúsinum**
21.05 **Fólk og móti 1** (2)
21.45 **Watergate**
23.10 **Anna Lotta**
23.40 **Liðugt**

Fríggjakvøldið kl. 21.05

Fólk og móti



Hetta er sending í tveimum pørtum um vármótan í París.

Gunnar Larsen, kendi danskur mótafotografurin fekk loyvi at vitja í serligu hølunum, har mótafólk arbeiða. Her verður sagt frá arbeiðsumstøðunum m.a. hjá Marc Bohan, sum er listarligur leiðari í mótahúsinum Dior, Jean Louis Scherrer, Louis Feraud, Claude Maxime og France Andrevie.

Í hesum sendingum fara mótafólkini at greiða nærri frá teirra hugsan um móta, politik og list, sum teir mynda í mótaklæðunum, soleiðis sum vit uppliva tað í dag.

Sendingin er ikki bert ein upplýsandi sending fyri mótafólk, men eitt brot úr mótaheiminum, sum er øðrvísi enn vit vanliga hugsa.

Fríggjakvøldið kl. 19.30

Dýrafilmur

Vitjanin í dýraheiminum er hesaferð um pungdýr og súgdýr. Jens Olsen, biologur, teknar og sigur frá. Hann sigur m.a. um hesa sending:

— Tá jørðin var yngri og súgdjórini eitt nútímans fyribrigdi, var Australia ein heimspartur fyri seg. Á okkara døgum, fleiri milliónir ár seinni, liggur Australia sum Noa Ark miðskeiðis í Stillahavinum, við hópin av súgdjórum, sum ikki eru aðra staðni á klótuni.

SEndingin er í innihaldi ein frásøgn um øll hesi súgdýr í Australia.